granskingarráðið
RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS

Stuðulsskipan

til

fyrireiking til og arbeiði við altjóða umsóknum

Endamál

Endamálið við skipanini er at veita føroyskum umsøkjarum í altjóða verkætlanum fíggjarligan stuðul í byrjanartilgongdini, antin til netverksfund og/ella til ráðgeving, tá ið umsókn til altjóða granskingar- og nýskapanarútboð verður skrivað.

Føroyska íkastið í altjóða verkætlanini skal verða formligt og av týdningi í umsóknini. Tvs. at stuðul verður ikki latin til luttøku sum undirveitari ella um føroyski leikluturin hevur lítlan týdningi í verkætlanini.

Hendan skipanin er eitt ískoyti til netverksmøguleikarnar, sum føroyskir partar hava í COST-skipanini[1] ella øðrum líknandi skipanunum.

Skilmarking

Ein altjóða verkætlan er ein verkætlan, sum kann verða stuðlað av altjóða stuðulsskipan, sum Føroyar formliga eru partur í. Hetta er í løtuni norðurlendskar stuðulsskipanir, t.d. hjá NordForsk, og hjá Evropasamveldinum, t.d. Horizon Europe við tilhoyrandi útboðum í partaløgum og øðrum átøkum, ella umsókn til útboð hjá Evropasamveldinum, sum eru opin hjá triðjalondum at søkja í.

Hvør kann søkja?

Stuðul kann eftir væl grundaðari umsókn verða veittur umsøkjara, sum er í starvi hjá fyritøku ella stovni, sum rekur skrásett virksemi í Føroyum.

Umsøkjari til hesa stuðulsskipan skal verða skikkaður og hava rætt at søkja um stuðul í viðkomandi altjóða stuðulsskipan.

Tað ber bert til at fáa stuðul eina ferð til arbeiði við umsókn úr sama átaki hjá NordForsk ella sama øki í Horizon Europe.

Stuðulin verður lagaður til føroyska íkastið í umsóknini. Tað er ein fyrimunur at hava fleiri føroyskar luttakarar við í umsóknini.

[1] COST - European Cooperation in Science and Technology. Skipan, sum kann stuðla uppbygging av netverkum v.m. Føroyar hava limaskap í COST-skipanini sum Near Neighbour Country – sí https://www.cost.eu/

Nær skal søkjast?

Søkjast kann, tá ið viðkomandi útboð, sum ætlanin er at søkja um stuðul til, er almannakunngjørt. Til dømis á heimasíðuni hjá NordForsk ella á Funding & Tenders portalinum hjá Evropasamveldinum.

Um til ber, verður mælt til at senda undanumsókn inn, so skjótt kunning fæst um eitt ávegis útboð, so til ber at meta um, hvørt umsøkjari lýkur formligu treytirnar.

Umsókn um stuðul skal verða Granskingarráðnum í hendi í seinasta lagi 6 vikur áðrenn ta freist, sum er ásett av stuðulsveitaranum í almenna útboðnum.

Stuðul verður ikki veittur afturvirkandi.

Umsóknarmannagongd

Umsókn skal verða send umvegis umsóknarportalin hjá Granskingarráðnum, har vegleiðing og neyvari treytir til umsøkjarar eru ásettar.

Tað verður ikki ásett freist fyri umsókn til hesa stuðulsskipan. Umsóknir verða viðgjørdar leypandi. Svar skal verða givið innan 10 arbeiðsdagar frá umsóknin er móttikin.

Fyrisitingin í Granskingarráðnum metir um og tekur avgerð um stuðul.

Umsóknin skal innihalda:

- upplýsingar um føroyska toymið við stovnum og/ella fyritøkum
- upplýsingar um, hvat stuðulin skal nýtast til
- tilvísing til útboðið, sum ætlanin er at søkja
- eina stutta lýsing av ætlaðu verkætlanini og
- eina grundgeving fyri stuðulstørvinum

Avgerðin hjá Granskingarráðnum byggir á ítøkiliga meting av innkomnu umsóknini.

Í metingini verður dentur lagdur á útboðið og á fakligar førleikar hjá stigtakarunum at gjøgnumføra verkætlanina í uppskoti.

Stuðul

Stuðul kann verða veittur til:

1. **Netverksfyrireikan**

   Stuðul kann verða veittur til luttøku í átøkum og netverksfundum uttanlands, tá ið samtak (Consortium) verður sett saman.

   Stuðul kann verða veittur til luttøku í meklaraátaki (Brokerage Event) ella líknandi, har endamálið er at hitta samstarvspartar og byrja nýtt samstarv um eina umsókn.

   Játtað kann verða upp til 10.000 kr. til hvønn føroyskan luttakara til endurrindan av flogferð og gisting, sum kostnaðarliga skal fylgja almennu reglunum fyri tænastuferðir. Stovnurin/fyritøkan, sum

viðkomandi arbeiðir hjá, skal bera kostnaðin av arbeiðstíð, dagpengum, ferðatrygging og møguligum øðrum útreiðslum. Stovnurin/fyritøkan skal leggja út og fær skjalprógvaðu útreiðslurnar endurrindaðar frá Granskingarráðnum.

Stuðul kann í mesta lagi latast til tveir luttakarar til sama átak.

2. Ráðgeving til størri umsóknir

Er talan um størri umsókn til t.d. ERC, MSCA, EIC, Widening, ella har føroyskur umsøkjari skal vera Coordinator, kann stuðul verða játtaður til uttanhýsis ráðgeving í samráði við Granskingarráðið.

Ráðgevi verður funnin í samstarvi við Granskingarráðið og stuðulsupphæddin ásett í mun til stødd á umsókn og neyðugu ráðgevingina.

Stuðulin kann vera frá 15.000 kr. til í mesta lagi 70.000 kr. Stovnurin/fyritøkan skal leggja út og fær skjalprógvaðu útreiðslurnar endurrindaðar frá Granskingarráðnum.

Við stuðulstilsøgn fylgir krav um, at Granskingarráðið skal hava kunning frá stuðulsmóttakaranum, tá umsóknin er send altjóða skipanini.

Fíggjarkarmar

Hendan stuðulsskipan er treytað av játtan á løgtingsfíggjarlógini á kontu *7.23.6.24. Altjóða granskingar- og menningarsamstarv*.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið ásetir upphæddina, sum árliga er tøk til skipanina. Stuðul kann verða veittur, til játtanin er uppi.

Granskingarráðið umsitur stuðulsskipanina.

Skipanin verður at eftirmeta á árligum fundi millum Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Granskingarráðið.

Góðkend 14. mai 2025